# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Elinborg Trónd Johansen, Tórshavn**, andaðist hósdagin 20. november, 80 ára gomul.

**Dagurin**
**24. november.**
**Chrysogonos**, deyður umleið ár 300. Halgisøgurnar siga, at hann var kristin einbúgvi, sum varð tikin av døgum meðan Diocletianus var keisari.

Lesið Sosialin -tað loysir seg

# Elinborg Trónd Johansen farin

So bórust boðini, at Elinborg Trónd er farin 80-ára gomul.

Seinast eg hitti Elinborg, var í Mettustovu, tá ið fyrsta Mettan varð handað „Guðrun & Guðrun" tann 7. novembur - fyri bert 2 vikum síðani. Elinborg var við, væluppløgd og fryntlig sum altíð.

Grundarlagið undir Mettugrunninum er skeið, hildið á Háskúlanum, meðan Elinborg sat sum forkvinna í Kvinnufelaga Samskipan Føroya. Jórun Poulsen fekk til uppgávu og átók sær at seyma mynd til Háskúlan. Hendan myndin varð gjørd til plakat og seld.



Elinborg var undangongukvinna, og mangt fekk hon í lag. Skipaði eitt nú sum KSF-forkvinna fyri fyrsta íbirtara-skeiðnum í Føroyum fyri kvinnuligum íverksetarum. Elinborg var við í øllum friðargongum úti í heimi, sum tær norðurlensku Kvinnur fyri friði skipaðu fyri, og hon var eisini við til at skipa fyri føroyskari luttøku á ymisku kvinnuráðstevnunum.

Stevnan í Oslo, **Forum 88**, verður mangan havd á lofti. Føroyskar kvinnur fingu Smyril sum hotelskip, meðan stevnan var fyri, og høvdu pláss við Kongabryggjuna mitt í Oslo alla ta tíðina. Vakrar seymaðar myndir av túrinum prýða Mettustovu. Elinborg sat hendan dagin í Mettustovu og peikaði út, hvat stavaði frá hennara gomlu kjólum.

Elinborg stillaði upp og varð vald í eldraráðið í Tórshavnar Kommunu. Hon sat hesa fyrstu setanina, men stillaði ikki upp aftur.

Elinborg dugdi so sera væl, og livandi, at siga frá; ein sannur søgusigari.

Eg komi at smílast, tá eg hugsi um hetta. Livandi, stuttlig og kreativ. Soleiðis var Elinborg.

Vit minnast við takksemi Elinborg og senda okkara samkenslu til Finn, synir, verðdøtur og ommubørn.

**Inga Ellingsgaard**

†

**Martina Petersen**
á Kósini, Klaksvík

andaðist á Sambýlinum á Heygnum sunnudagin 23. november, 90 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni mikudagin 26. november kl. 13.30.

**Børnini**

# Jólasølan hjá Føroya Heimavirkisfelag

Árliga jólasølan hjá Føroya Heimavirkisfelag verður í ár 29. og 30. november í Ítróttarhøllini á Hálsi. Á sølubásunum verður eins og undanfarin ár, eitt stórt úrval av heimavirkaðum lutum/pløggum, bæði virkað siðbundi føroyskt og við nýggjum íblástri. Eisini verður café á staðnum við føroyskum viðskera og onkrum søtum omaná.

Opið verður hesar tíðir: Leygardagin frá kl. 10 til 19 og sunnudagin frá kl. 14 til 19.

Atgongumerkið kostar kr. 30,00 fyri vaksin, meðan børn upp til 14 ár hava ókeypis atgongd.

Atgongumerkið er samstundis lutaseðil um trý gávukort á kr. 500,00 og trý gávukort á kr. 300,00 úr handlinum hjá felagnum, Tina Mik, Niels Finsensgøta 35, Tórshavn, har eisini er stórt úrval av heimavirkaðum lutum.

Føroya Heimavirkisfelag ger vart við, at ikki ber til at gjalda við gjaldskorti á flestu básunum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Jacobina Sørensen**
ættað úr Hvalba, búsitandi í Havn,

andaðist fríggjadagin 21. november á Lágargarði, 88 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Fyri tey avvarðandi*
**Ebba, Marita, Anna, Joen Pauli og Finngerð við familjum**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum sýndu samkenslu og luttóku í sorgini, tá elskaða dóttir og systir okkara

**Birgit Sólstein**

doyði og varð jarðað, takka vit inniliga.
Vit takka Christianskirkjuni, vinkonum og øðrum, sum á ymsan hátt hjálptu til við jarðarferðina, limum í FSO fyri vakran tónleik.
Vit takka fyri kransar, blómur, brøv og troystarorð, og takka øllum tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Katrin og Alex**
**Andras, Páll og Kári við familju**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Elydia Haldansen**
Vestmanna

doyði og varð jarðað.
Vit takka presti fyri troystarík orð á Mørkini og í kirkjuni, somuleiðis takka vit kirkjutænarum, sangarum, berarum, gravarum og tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Vit takka tykkum á Mørkini fyri tíðina, hon var hjá tykkum.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Mørkina.
Tøkk øll tit mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjurnar vegna*
**Ewald, Hans Pauli, Maria, Emilja og Jóan Dávid**